## Dímun á DR

Í kvøld verður sending á DR1 um lívið á Dímun. Tað er væl umtókti verturin og ferðamaðurin, Søren Ryge, sum hevur verið á ferð í Dímun. Undir yvirskriftini: Ein familja, 1.000 seyðir, tríggir hundar og tveir hestar, fer Søren Ryge at greiða frá, hvussu lívið á Dímun er hjá húskinum, ið búleikast har. Sendingin verður send klokkan 19 á DR1, og hon verður endursend komandi mikudag klokkan 13.30.



## 11 milliónir í halli

Maru Seafood, sum er eitt av størstu fiskivinnusamtøkunum í landinum, er eisini hart rakt av tungu gongdini í høvuðsvinnuni. Stjórin, Jóhan Páll Joensen, staðfesti á Rás2 í gjár, at samtakið í fjør hevði eitt undirskot á 11 milliónir krónur. Tey trý virkini, sum felagið rekur í Klaksvík og á Eiði, hava út við 200 fólk í arbeiði, og einir 100 mans eru knýttir at teimum átta skipunum hjá Maru Seafood. Ein av fyrstu døgunum verður aðalfundur í Maru Seafood. Og tað verður ein døpur staðfesting av árinum í fjør, sum Jóhan Páll Joensen tá fer at leggja fyri eigararnar. Stjórin í Maru Seafood, hevur ikki góðar vónir fyri árið í ár. Hann roknar við, at Maru Seafood eisini í 2008 kemur at hava undirskot.

# Maru Seafood flýtur tungt í sjónum



**Hallið av virkseminum hjá samtakinum Maru Seafood er 11 miljónir krónur í 2007, og vánalig útlit eru til árið í ár, sum higartil eisini hevur givið hall**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt/Rás2*

Eitt av størstu fiskivinnusamtøkunum í Føroyum merkir sviðan av tungu gonngdini í fiskivinnuni.

Maru Seafood hevði 11 miljónir krónur í halli í fjør.

Tað staðfestir stjórin í samtakinum, Jóhan Páll Joensen.

Maru Seafood er eitt av teimum heilt stóru fiskivinnusamtøkunum í Føroyum. Fyritøkan fevnir bæði um virkir og skip. Tey trý virkini, sum felagið rekur í Klaksvík og á Eiði, hava út við 200 fólk í arbeiði, og einir 100 mans eru knýttir at teimum átta skipunum hjá samtakinum.

Ein av fyrstu døgunum verður aðalfundur í felagnum, og tað verður ein døpur staðfesting av árinum í fjør, sum Jóhan Páll Joensen, stjóri, tá fer at leggja fyri eigararnar.

- Úrslitið fyri árið 2007 gevur eitt hall upp á 11 miljónir krónur.

### Vánalig skipavinna

Stjórin sigur, at høvuðsorsøkin til stóra hallið er at finna í eini vánaligari drift av skipunum hjá felagnum.

- Vit hava havt ógvuliga nógvar útreiðslur upp á okkara skip, sum faktisk hava gingið illa. Tað er tí fyrst og fremst í skipunum, at tað stóra hallið er at finna.

Spurdur, hvat hann sum stjóri í felagnum heldur um úrslitið í fjør, sigur Jóhan Páll:

- Hetta er eitt úrslit, ið man sum stjóri sjálvandi ikki er nøgdur við. Tað er ógvuliga keðiligt at koma út við einum slíkum úrsliti.

Stjórin sigur, at leiðslan í Maru Seafood hevði vónað, at úrslitið fyri farna ár fór at vera betur enn tað, sum nú fyriliggur.

- Vit høvdu sjálvandi vónað, at vit kundu víst á eina drift, sum var positiv, men hetta hevur víst seg at vera ógvuliga trupult.

Maru Seafood-samtakið hevði eisini eitt hall í 2006, og nú er so hallið upp á 11 miljónir krónur eisini staðfest.

### Stóra ávirkan

*Vit spurdu eisini Jóhan Páll, hvussu hetta ávirkar samtakið?*

- Tað er klárt, at ávirkanin er ikki góð. Hetta er avgjørt ikki positivt fyri okkara samtak.

*Men í hvønn mun fer hetta at ávirka samtakið – á sjógvi og landi?*

- Hetta kemur at avmarka okkum, og hetta ger tað neyðugt at umhugsa, hvat vit skulu gera fyri at kunna yvirliva. Vit mugu hygga eftir, hvat vit kunnu gera fyri at hava eina framtíðar drift, og tá verður neyðugt at hugsa um allar møguleikar. Tað er greitt.

*Kann tað hugsast, at virksemið verður niðurlagt?*

- Um hetta verður neyðugt, gera vit tað, sigur stjórin.

*Vit spurdu eisini Jóhan Páll Joensen, hvørji útlitini eru fyri 2008?*

- Fyrstu seks mánaðirnar í ár vísa eisini hall. Í ár eru tað serliga oljuprísirnir, sum hava ávirkað raksturin. Vit hava havt eina positiva drift uppi á landi, meðan skipini framvegis hava eina drift, sum gevur hall. Hetta er serliga orsakað av høgu oljuprísunum.

### Skip hava ligið

Jóhan Páll Joensen sigur, at

# Flennandi heimaftur til húsa



**Eystanstevnukabarettin er stuttligari enn nakrantíð, nú hon verður spæld fyri sjeyndu ferð í fimleikarhøllini í Glyvra skúla. Tað siga tey, sum hava fingið ein »smakk« av kabarettini**

KABARETT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hevur tú hoyrt um skilið í Runavíkar býráði, nýggja skúlan í Runavík – ella hevur tú hoyrt nýggjasta slatrið úr tí